Inter ikki til at steðga

Inter vann aftur í italsku Seriu A um vikuskiftið. Mótstøðuliðið hesaferð var botnliðið Parma, og Inter vann dystin 2-0. Maxwell og Crespo syrgdu fyri málunum. Inter hevur havt eitt framúr gott kappingarár og liggur langt á odda í italsku kappingini. Eftir dystirnar um vikuskiftið er Inter 20 stig frammanfyri Roma á øðrum plássi, og tí er tað rættiliga farið at lukta av gulli í felagnum úr Milano.

Wigan sendir norðmann heim

Enska felagið Wigan leigaði fyrr í ár Kristofer Hæstad úr felagnum Start. Hæstad er fyrrverandi liðfelagið hjá Toda Jónsson og hevur staðið seg væl í norsku kappingini seinnu árini. Wigan leigaði Hæstad í eitt hálvt ár, men felagið hevur nú gjørt av, at hendan avtalan skal ikki leingjast. Hæstad hevur spælt 97 minuttir fyri Wigan, nú hann verður sendur heimaftur til Noregs.

Eru ikki nóg konsentreraðir

Sámal Joensen, landsliðsleikari og liðformaður hjá GÍ, heldur, at talan var um ein javnan dyst í Sarpugerði í gjár.

– Tað var ein fínur dystur, um vit hugsa um, at talan var um ársins fyrsta landskappingardyst. Bæði liðini royndu at spæla bólt, men til tíðir gekk tað kanska ov skjótt fyri seg.

– Tað leikaði rættiliga javnt á, men teir fáa so eitt mál, tá vit ikki eru nóg konsentreraðir ta einu løtuna. Vit velja so at satsa fyri at fáa eitt stig og tað kostar, har vit fáa eina útvísing og teir eitt mál, sigur Sámal Joensen og vísir á, at tað er líkamikið, um tú tapir við einum ella tveimum málum.

Gøtumenn vóru í øðini, tá EB/Streymur skoraði fyrsta málið, og tá Geza Turi varð vístur av vøllinum.

– Nú sá eg ikki heilt hvat hendi, tá fyrra málið kom, men teir søgdu at Geza Turi varð skumpaður á veg út og tí fór skeivur av bóltinum. Geza plagar ikki at øsa seg vanligt, men var í øðini um málið, so eg ivist ikki í, at har hevur verið okkurt. Reyða kortið var ein ófantalig takling, men um hon var til útvísing, so áttu bæði Ronnie Samuelsen og Pól Ennigarð eisini hvør sítt reyða kort, metir Sámal Joensen.

-rwd

GÍ

EB/Streymur

GÍ – EB/Streymur 0-2 (0-0):

Stjólu sigurin í yvirtíðini

Í evstu løtu basti EB/Streymur GÍ, men Gøtumenn mugu kenna seg nakað snýttar og nipnar, tí í samfullar 90 minuttir høvdu teir verið minst líka væl við í dystinum sum felagsliðið, men í yvirtíðini stjól EB/Streymur sigurin og stigini

Dysturin í Gøtu var tættur, men við tveimum seinum málum tryggjaði EB/Streymur sær sigurin
Mynd: Sofus Johannesen

FÓTBÓLTUR

Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

EB/Streymur hevur fingið trý tey fyrstu stigini á kontoina í ár, meðan GÍ hevur smakkað ársins fyrsta tap. Soleiðis ljóðar veruleikin úr Sarpugerði nú fyrstu Formuladystirnir í ár eru farnir aftur um bak.

Fyri gøtumenn man tapið vera ein herskin biti at svølgja. Fram ímóti dystarenda stóð á jøvnum, og um nakar hevði verið oman á, so var tað helst heimaliðið. Líka legði Marni Djurhuus í, tí hann prikaði bóltin í netið eftir hornaspark, har gøtumenn mettu, at málverjin Geza Turi varð forðaður í at koma út eftir bóltinum. GÍ-leikararnir vóru í øðini, men dómarin Páll Augustinussen lat ikki við seg koma.

Lítla løtu seinni var Geza Turi aftur í andglettinum. Hesaferð tá hann var komin alt ov langt út um brotsteigin og fyri at verja málið, helst ikki sá aðrar møguleikar enn at takkla Ronnie Samuelsen, sum hevði fingið bóltin, ið Geza Turi hevði sparkað burtur. Taklingin var ógvuliga ófantalig, og dómarin sá seg ikki hava aðrar møguleikar enn at vísa málverjanum av vøllinum.

Stutt eftir útvísingina av Geza Turi staðfesti EB/Streymur sigurin, tá innskifti Leif Niclasen setti bóltin í netið, eftir at pólski Rafal og Bárður Olsen høvdu syrgt fyri uppspælinum.

Málleyst men við stórum møguleikum

Fyrri hálvleikur var málleysur, men ikki uttan málmøguleikar. Stóru kjansirnir komu tó ikki fyrr enn beint upp undir steðgin. Fyrst varð Hanus Eliasen spældur leysur av Sorin Anghel, men lobbarin, sum fuglfirðingurin royndi seg við, var ikki serliga væleydnaður og fór við síðuna av málinum.

Í hinum endanum royndi fyrst Atli Gregersen seg við einum stútara eftir hornaspark, men René Tórgarð bjargaði flott. Síðani spældu Áslakkur Petersen og væl upplagdi Sámal Joensen seg niðan eftir vøllinum, áðrenn Pól Ennigarð slapp at royna seg úr stuttari fjarstøðu, men aftur hesaferð stórbjargaði René Tórgarð.

Liðini komu óbroytt út til seinna hálvleik, og dysturin var so at siga tann sami sum í fyrra hálvleiki. Fótbóltsspælið var ikki tað vakrasta og langt var ímillum stóru kjansirnar. Ein orsøk til hetta var harða spælið, sum til tíðir merkti dystin.

Fyrsta veruliga møguleikan í seinna hálvleiki fekk felagsliðið, tá Símun Eliasen og Hans Pauli Samuelsen í felag broderaðu seg niðan eftir høgru síðu, og víkamaðurin legði ein góðan bólt innfyri, har Sorin Anghel tveitti seg fram og setti høvdið á. Eitt gott álop har allir gjørdu alt rætt, eisini Geza Turi, sum við ein framúrskarandi bjarging forðaði fyri, at bólturin endaði í málinum.

Mál og útvísing

Sum dysturin leið ímóti endanum bendi alt á, at tað fór at enda málleyst í Gøtu. Tað hevði leikað javnt á, og málverjarnir báðir høvdu hvør í sínum lagi imponerað.

Men eftir hornaspark móti dystarenda fekk EB/Streymur mál. Hornaspark varð lagt inn fyri og tað endaði við, at Marni Djurhuus beindi bóltin í netið.

Í eini roynd at fáa stig tveitti GÍ alt fólkið fram og trýsti eisini EB/Streym, áðrenn Geza Turi sá reytt fyri eina ófantaliga takling.

Mønustingin fingu gøtumenn stutt eftir útvísingina, tá Rafal Kwiecinski fór niðan í høgru og fann Bárð, sum legði bóltin fyri føturnar á innskifta Leif Niclasen, ið skoraði trygt.

Dysturin endaði sostatt við einum tveymála sigri til felagsliðið úr Sundalagnum, men sigurin var ikki tryggur, sum úrslitið bendir á. Gøtumenn kenna seg nipnar, tí teir høvdu eina stigið í hondini allan dystin, men tað var tikið frá teimum í yvirtíðini.

Frálík byrjan uppá árið

– Hatta var ein javnur dystur, sum eins væl kundu enda við javnleiki. Bæði liðini høvdu góðar málmøguleikar og málverjarnir gjørdu tað fantastiskt. Soleiðis tekur Marni Djurhuus, landsliðsleikari og fyrri málskjúttin hjá EB/Streymi í sigrinum í gjár, saman um dystin. Hann er fegin um sigurin og góðu byrjanina, sum lið hansara nú hevur fingið.

– Sæð yvir allan dystin, høvdu vit helst ikki verið so keddir um ein javnleik, men frammanundan høvdu vit ætlað okkum trý stig og tað fingu vit so.

– Hetta var ein frálík byrjan upp á árið, har vit ætla at gera sum í fjør, og so kanska eisini vinna síðsta dystin eisini, sigur varaliðformaðurin hjá felagsliðnum, sum speiskliga sipar til farna kappingarár, har avgerðin um FM-heitið lá í teirra hondum, men teir mistu alt á gólvið móti KÍ á heimavølli og HB soleiðis gjørdist meistari.

-rwd